# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum gleddu meg á 70 ára føðingardegnum

Blíðar heilsanir
**Sighvatur Sighvatsson, Skála.**



## Elsa Wolles 60 ár

Mánadagin 18. august fyllir Elsa Wolles í Havn 60 ár. Elsa er ættað úr Klaksvík, dóttir Elsu Mariu og Martin Sivertsen,

Sum 14 ára gomul fór hon at arbeiða í Radiohandlinum hjá Marsten í Klaksvík, har hon var í nøkur ár. Síðani flutti hon til Havnar, har hon arbeiddi hjá Marstein á Áarvegnum, til hon giftist í 1970 og var heimaarbeiðandi í 17 ár.

Elsa giftist við Karl Wolles úr Havn. Tey bygdu hús í Stoffalág og fingu trý børn: Jóhann, Elsebeth Maria og Signhild. Ommubørnini eru 3 í tali: Jóna, Rita og Karl.

Í 1987 fekk hon arbeiði í køkinum á Stella Maris Vøggustovu, og síðan 1998 hevur hon verið stuðul, bæði í barnagørðum og í Sankta Frants Skúla. Allastaðni har Elsa hevur arbeitt, hevur hon verið sera væl dámd við sínum lætta og blíða lyndi.

Hjartaliga tillukku við føðingardegnum og takk fyri alt sum tú ert fyri okkum.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Børnini**

## Føroyar mítt land

Tær fimm sendingarnar í røðini »Føroyar, mítt land« í hesi vikuni fevndu rættiliga víða, bæði í dámi og tíð. Í teirri fyrstu sendingini varð umrøddur David Vithusen, sum var landkirurgur í Føroyum í fyrru helvt av nítjandu øld, síðani komu nakrar hugleiðingar – bæði skemtiligar og umhugsnarverdar – um ein sandoyartunnil, vit fingu nakrar hentar vegleiðingar um móðurmálið, hoyrdu um skaldakvinnuna Hjørdis Djurhuus Nielsen, og at enda hoyrdu vit um kirkjuna í Skálavík og um staðanøvn uttangarðs har í bygdini. Freydis Poulsen, Eirikur Lindenskov, Heri Tróndheim, Turið Sigurðardóttir og Janus Mohr løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna. Og hesar sendingar verða aftur at hoyra nú sunnudagin kl. 13.00.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

Mánadagin 18. august: Maria Jacobsen
Týsdagin 19. august: Jógvan við Keldu
Mikudagin 20. august: Janus Mohr
Hósdagin 21. august: Marius Rein
Fríggjadagin 22. august: Ólavur Clementsen

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23, (týsdag tó 22.30).



## 70 ár

Leygardagin 16. august fyllir Oddvør Djurhuus í Hósvík 70 ár. Føðingardagurin verður hildin heima á Rættarvegi 1.

## Dagur

16. august. Rokus, deyður umleið ár 1330. Varð føddur í Montpellier og gjørdist kendur sum tann, ið grøddi fólk, ið vóru rakt av sótt. Tá ið hann kemur til hús eftir ein pílagrímsferð til Róm, verður hann lagdur undir at njósnast, verður tikin og kastaður í fangahús, har hann doyr.

17. august. Anastasius. Annaðhvørt tann Anastasius, sum var biskupur í Terni í Italiu í 6. øld ella ein Anaststius, ið doyði sum pínsluváttur í Persiu umleið ár 620.

18. august. Agapetus, deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

## Føðingar



*10. august fingu Elin S. Michelsen og Símun Eliasen í Hoyvík fingu ein son. Hann vigaði 3800 gram og var 54 cm langur. Á myndini stoltu systrarnar, frá vinstru stórasystur Hildur og Lea, sum situr undir lítla beiggjanum.*

25. juli fingu Lív og Torleif Waagstein, Snertinge, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3830 gr.

7. august fingu Tine Brovall og Allan Manai, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3050 gr.

8. august fingu Astrunn Debess og Jens Christian Hansen, Argjum, ein son. Hann var 44 cm langur og vigaði 1760 gr.

8. august fingu Edna Nielsen og Rui Martins, Køge, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3880 gr.

8. august fingu Laila Petersen og Rene Havmand, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

9. august fingu Jónley og Hans Poulsen, Sørvágur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

9. august fingur Rúna M. Olsen Davidsen og Tony L. Davidsen, Sandavágur, ein son. Hann var 54 cm og vigaði 3925 gr.

10. august fingu Hanna og Hugo Skorastein, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

10. august fingu Anna Margreta Hansen og Sonhard Dalfoss, Hósvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 4275 gr.

11. august fingu Mai Fuglø og Christian Fagraberg, Norðdepli, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2800 gr.

11. august fingu Berit og Poul Juul Vilhelmsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

12. august fingu Fríða Hentze Magnussen og Esmar Petur Petersen ein son. Hann var 51 cm lagur og vigaði 3500 gr.

12. august fingu Katrin og Gordon Rajani eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.